



Jónas (1)

Eingin kann rýma frá Gudi

Gud segði við Jónas: »Far til Nivive...«, men Jónas var ræddur og vildi ikki akta og fara og siga tað, ið Gud bað hann.



So ístaðin fór Jónas til Tarsis.



Mamma Jens bað hann fara eitt ørindi fyri seg – men Jens tímdi ikki.

Hann fór heldur at spæla – men so bleiv hann uppdagaður!



Gud visti alla tíðina hvar Jónas var.

Eingin kann rýma frá Gudi.

(Meira um Jónas næstu ferð)

Andlát

27. desember:
Johanna Magdalena Johannesen, nevnd Baja, ættað av Skála, búsitandi í Kalrslunde, 53 ára gomul.

28. desember:
Poul Johannes Eliasen, Porkeri, 87 ára gamal.

29. desember:
Jóannes Hammer, Eiði, Jóannes á Forðunum, 84 ára gamal.
Hanna Jacobsen, fyrrverandi sjúkrasystir, Tórshavn, 88 ára gomul.

31. desember:
Dánjal Nielsen, Vatnsoyrum, 81 ára gamal.

1. januar:
Óli Svenn Kjærbæk, búsitandi í Nykøbing F., ættaður úr Sumba, 77 ára gamal.
Niels Als Jensen, ættaður av Tvøroyri, búsitandi í Havn, 65 ára gamal.
Lítli **Hilmar Geir,** sonur Marnhild Kambsenni úr Fuglafirði, búsitandi í Íslandi, og Sigurgeir.


2. januar:
Margrethe Lindenskov Samuelsen, Fuglafirði, 81 ára gomul.

4. januar:
Niels Rasmussen, vanliga nevndur Niels í Køk, av Sandi, búsitandi í Danmark, 86 ára gamal

Blindastovnur Føroya
hevur opið mándag–friggjadag kl. 9–16.
Telefonir: 18222 og 19288.

KROSSORÐAGÁTA

Loysnin frá seinastu viku



Vinnari: Jaspur Joensen, Uppi á Mýru, Sørvági

Hvønn leygardag
verður krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin hesaferð eru allar tær 6 »SKEMT-bøkurnar« hjá Óla Petersen.

Hósdagur
Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, mugu loysnirnar vera okkum í hendi í *seinasta lagi hósdagin.* Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendi gátuna til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta« á bjálvan.

Navn

Bústaður

Bygd/býur

